Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður

Svarari: Bárður á Steig Nielsen, løgmaður

Evni: Russar og ukrainar í Føroyum

Spurningar:

1. Eru Føroyar fyrireikaðar til møguligar illstøður millum russar og ukrainar í Føroyum?

2. Hvat hevur landsstýrið gjørt – ella ætlar at gera, fyri at fyribyrgja slíkum støðum?

Viðmerkingar:

Løgtingið hevur samtykt, at Føroyar skulu taka ímóti 200 flóttafólkum úr Ukraina. Samtíðis hevur landsstýrið tikið støðu til, at Føroyar í fyrsta umfari ikki fara at seta russiskum skipum forboð fyri at koma í føroyskar havnir.

Hetta merkir, at vit komandi tíðina fara at hava fólk úr báðum fíggindalondunum, Russlandi og Ukraina, í Føroyum. Hesi londini eru í kríggi, og tað kann lættliga henda, at illstøður kykna, har annar parturin vil hevna seg inná hin. Tað kann seta Føroyar í eina óhepna støðu. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 19. apríl 2022

Helgi Abrahamsen